# Martin Poulsen vann á stórmeistara

Martin Poulsen legði bragdliga fyri, tá 1. umfar av Klaksvík International 2008 varð telvað leygardagin. Við svarta fólkinum hálaði Martin sigurin heim ímóti stórmeistaranum GM Miroslaw Grabarczyk úr Pólandi. Talan er um satt bragd av Martini, tá hugsað verður um, at stórmeistarin úr Póllandi eftir styrkismetingini var greiður favorittur í uppgerðini. Eisini Heini Olsen, úr Klaksvík, fekk eitt megnarúrslit til høldar í 1. umfari, tá hann við hvíta fólkinum telvdi javnt ímóti enska stórmeistaranum GM Gawain Jones. Heini var sera væl fyrireikaður til talvið og eftir 33 leikir bjóðaði bretin javnt. Tað lá leingi í kortunum, at føroyingarnir av álvara gjørdu hol í sjógvin í 1.umfari, tí Olaf Berg, úr Tórshavn, við hvíta fólkinum, eftir uml. 15 leikir, hevði greiðan fyrimun ímóti stórmeistaranum GM Sarunas Sulskis úr Litava. Spell hjá Olafi, at Sulskis tá avtornaði, allíkavæl, vann talvið. Samanumtikið ein sera góð byrjan hjá føroyingunum í Klaksvík International 2008 –sterkasta kapping, sum telvað er í Føroyum nakrantíð.



# Lands-krona var nakað annað

**Tað er keðiligt, at vit støðugt verða sammettir við nakað, sum vit allir eru ernir av. Men tíbetur prógvaðu vit so í júst hesum dystinum, at vit eisini kunnu skapa úrslit**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Vindurin órógvaði nógv, helt Jákup Mikkelsen, sum als ikki fekk ruddað bóltarnar nóg langt burtur fyrstu trý korterini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast hann ikki var í hópinum, tá sigurin móti Eysturríki varð fingin til høldar, so verður Jákup Mikkelsen oftani sagdur at vera einasta sambindingarliðið millum landsliðið tá og nú.

Ofta hevur dagsins landslið eisini verið sammett við tað, sum skapti undrið í Landskrona, men Jákup Mikkelsen heldur ikki, at hetta er nakað, sum hevur tyngt menninar á liðnum í dag.

- Tað haldi eg ikki. Um nakað, so eru vit kanska eitt sindur keddir um, at vit verða sammettir við tað liðið. Tí vit eru allir stoltir av tí, sum teir framdu ta ferðina, og tí er tað kanska keðiligt at skula prógva, at vit eru líka góðir, sum teir vóru. Tað er jú heilt hvør sín tíð, og tí kann tað ikki samanberast uttan víðari.

- Hinvegin slepst ikki undan, at vit av og verða konfronteraðir við tann spurningin. Ikki minst hesaferð, nú vit spældu móti Eysturríki. So á tann hátt var tað ein lætti, at vit eisini rukku setninginum í júst hesum dystinum.

- Vit hava eisini spælt eina rúgvu av dystum, sum hava líkst hesum. Men aloftast tørnar tað soleiðis út, at hinir í seinasta enda skora eitt ella tvey mál meira enn vit.

Teir høvdu so eisini møguleikarnar at skora bæði eina og tvær ferðir. Var hetta ein av teimum strævnu dystunum í føroyska málinum?

- Ja, tað haldi eg. Ikki minst tí vindurin var somikið nógvur. Fyri steðgin var vindurin beint ímóti, og tað órógvaði spælið við beinunum hjá mær. Nakað sum annars er ein av styrkjunum hjá mær.

Men eftir steðgin var vindurin undan, og ta einu ferðina stóð teirra málverji á miðjum vølli, tá tú fekk bóltin. Hugsaði tú ongantíð, um tú skuldi royna eydnuna við einujm 100 metra sparki?

- Nei. Eg hoyrdi okkara áskoðarar rópa øgiligt ta einu ferðina, men eg fangaði støðuna ov seint, so eg kom ongan tíð til at hugsa tann tankan, sigur Jákup Mikkelsen

# Gummibeinini burtur

**Um nakað, so vóru tað eysturríkarar, sum høvdu gummibein, og sum dysturin leið komu frustratiónirnar hjá teimum alt meira fram, heldur Egil á Bø**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Sum veðurlíkdinini vóru, so var tað kanska ein fyrimunur hjá Egili á Bø, at hann ofta hevur spælt við bítandi norðanættini ímóti sær*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinastu vikurnar hava Egil á Bø og liðfelagarnir í EB/Streymi hoyrt nógv um gummibein og tað, sum har til hoyrir.

Leygardagin kundi hann tó staðfesta, at á Tórsvølli var einki tos um gummibein av nøkrum slag.

- Nei. Kanska havi eg havt tey somikið leingi, at tað ger tað sama nú, segði hann skemtandi.

- Men hetta er fullkomuliga øðrvísi enn at spæla í Formula-deildini. Í dag skal man bara inn at stríðast av øllum alvi. Í veruleikanum kunnu vit ikki rokna við øðrum enn tapi, tí á pappírinum eru vit nógv verri enn hini liðini, so vit hava einki at óttast í so máta. Tú kanst í veruleikanum bara vinna.

Tað var líkt til, at tit høvdu nógv minni trupulleikar av vindinum, enn teir hjá Eysturríki høvdu. Var tað kanska ein fyrimunur hjá tær, at tú hevur spælt so nógvir dystir á Mølini á Eiði, har vindurin kann verða heilt nógvur?

- Tað skuldi mann kanska trúð. Vit eru nokk meira vanir við vind, enn teir eru.

Og í øllum førum skaptu teir ikki so nógv. Í seinna hálvleiki spæla teir øgiliga nógv við longum bóltum, og teir kombinera sjáldan flatt, og tað passaði nokk okkum fínt.

At síggja til gekk ikki long tíð, áðrenn teir byrjaðu at geva frustratiónir til kennar. Var tað eisini nakað, sum tit merktu á vøllinum?

- Eg haldi tað. Teir høvdu einar tvær-tríggjar støður fyri steðgin, sum kundu blivið heilt vandamiklar, men umframt tað, so høvdu teir ikki so heilt ræðuliga nógv. Teir høvdu eitt sindur av trýsti, men ikki so heilt ræðuligt kortini. Og sum seinni hálvleikur gekk, haldi eg, at teir gjørdust rættiliga frustreraðir, sigur Egil á Bø.

